5. oktober 2006

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 7/2006

Tíð: Hósdagin 5. oktober 2006, kl. 10-12
Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Eivind Weyhe, vararektari og megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 6/2006 setursráðsfundi 31. august 2006.**
Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarmál**
   a. **Endurskoðað fíggjartøl 2006.** (J.nr. 0015-01595). *Fundarskjal: Uppskot til býti, dagfest 29.9.06.* Uppskotið staðfest. SSS sendir deildunum boð um nýggja býtið.

   b. **Fíggjarlógaruppskot 2007 til umrøðu.** (J.nr. 0015-01855). Uppskotið til FL07 gevur setrinum knappar 300 tkr meira í játtan. Hetta strekkir bara til lønir, tí orsakað av lønarhækkingum, nógv fleiri metingum o.ø, eru væntaðu lønarútreiðslurnar í 2007 munandi hægri enn í 2006. Setursráðið samtykti at halda ein serligan fíggjarfund í viku 43 at umrøða møguleikarnar í 2007.

4. **Felags eftirmetingarskal fyri undirvísingina.** (J.nr. 0040-01915). *Fundarskjal: Tilmæli frá SSS, dagfest 29.9.06.* Drúgt kjak um eftirmeting og hvussu hetta kann skipast praktiskt. Semja um at tað er rætt at hava eitt felags skjal, sum øll skulu brúka til at eftirmeta undirvísingina. Setursráðið samt um at royna skjalið, sum SSS hevur gjørt við støði í ymsum eftirmetingarskjølum, við smávegis rættingum. SSS arbeiðir víðari við, hvussu innsavning og eftirviðgerð kann skipast í praksis.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

5. **Uppskot frá Náttúruvísindadeildini til masterútbúgving í jarðalisfrøði.** (J.nr. 0043-1916). Fundarskjal: Uppskot frá Jim Brown, professara, dagfest 4.10.06. Málið varð eisini umrøtt á megindeildarráðsfundi á NVD 28.9.06. Setursráðið tók væl undir við hugskotinum og samtykti uppskotið í prinsippinum. Biðið verður um at fáa eina fíggjarframrokning til komandi fund fyri at vita, nær farast kann undir hesa útbúgvingina.

6. **Verkætlan um fólkateljing. Innlendismálaráðið setur fyrireikingarbólk til verkætlanina, Fróðskaparsetrinum stendur í boði at fáa umboð í bólkin.** (J.nr. 0011-01930). Setursráðið heitir á Ólavur Christiansen um at umboða Fróðskaparsetrið í bólkinum.

7. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 5.9.06.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 28.9.06.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

8. **Próvdómaragóðkenningar:**
   a. **Eftir áheitan frá Søgu- og Samfelagsdeildini hevur Mentamálaráðið góðkent Harry Haue, dr.phil., lektara á Institut for Filosofi, Pædagogik og Religionsstudier við Syddansk Universitet til *Søgu* og *Siðsøgu* og Nannu Hermansson, fil.lic. til *Siðsøgu*.**
   b. **Eftir áheitan frá Náttúruvísindadeildini hevur Mentamálaráðið góðkent Hjálmar Hátún, Ph.D., havfrøðing á Fiskirannsóknarstovuni til *Havfrøði*.**

   **At staðfesta.** (J.nr. 0026-01525). Staðfest.

9. **At staðfesta setan av Boga Hansen sum adjungeraðum professara í havfrøði á Náttúruvísindadeildini. Setursráðið hevur eftir tilmæli frá metingarnevndini sett Boga í starv, starvssetanin er galdandi frá 1.10.2006. Í metingarnevndini sótu: Detlef Quadfasel, professari í havfrøði á Zentrum für Meeres- & Klimaforschung, Universität Hamburg, Robert Dickson á Centre for Environment, Fisheries & Aquaculture Sciences i Lowestoft, Onglandi og Jean Claude Gascard, granskingarleiðara á Laboratoire D'oceanographie et du climat, Paris.** (J.nr. 0021-01840). Staðfest.

10. **Tilmæli um lim og varalim í Fjølmiðlanevndina. Rektarin hevur mælt Innlendismálaráðnum til at seta ávikavist Halgir Winther Poulsen, advokat og Marjuna Bæk, sóknarprest í nevndina. At staðfesta.** (J.nr. 0011-01880). Staðfest.

**Kunningarmál:**

11. **Mánaðarjavni ultimo august 2006, nýtsla fyri alt setrið 11.639.000 kr = 61 % av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01595).

12. **Val av studentaumboðum í megindeildarráðini lestrarárið 2006/07 verður aftaná heystfrí, dagurin ikki ásettur enn.** (J.nr. 0011-01887).

13. **Mentamálaráðið hevur biðið um viðmerkingar til uppskot til tvær nýggjar kunngerðir *Kunngerð um atgongd, upptøku, farloyvi o.a. við útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum* og *Kunngerð um ískoytisútbúgving fyri sjúkrarøktarfrøðingar, útbúnir eftir eldri lógum*. Setursskrivstovan hevur svarað.** (J.nr. 0010-01898).

14. **Hans Pauli Joensen hevur boðað Mentamálaráðnum frá, at hann tekur seg úr arbeiðsbólkinum, sum Mentamálaráðið setti at gera fyrireikingararbeiðið til eina Master-útbúgving í KT.** (J.nr. 0011-01702).

15. **Seminar/framsýning "The Provincialists" verður 28.-29.10.06, framsýningin verður í Listasavninum, og seminarið verður hildið í Ovastovu á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. 0056-01621).

16. **Frágreiðing frá Mariano González Campo, Murcia, Spania frá arbeiðsferð í Føroyum juli-august 2006. Mariano hevur fingið námsferðarstuðul í ár.** (J.nr. 0071-01587).

17. **Ráðstevna 25.-28.10.06 á Alexandru Ioan Cuza University, Iasi, Rumenia "Partnerships in the Bologna Process: Experiences and Challenges".** (J.nr. 0057-00155).

18. **Útgávur:**
    a. **De vestnordiske landes fælleshistorie II, ritstjórn Andras Mortensen, Alf R. Nielssen og Jón Th. Thór, INUSSUK Arktisk forskningsjournal 2.2006.**
    b. **Beretning 2006, Rigsombudsmanden på Færøerne.**
    c. **Årsberättelse 2005, Åbo Akademi.**
    d. **Faldari, Vinnuháskúlin – útbúgving til leiðslu á sjógvi og landi.**

Frágreiðing: Annika Sølvará